# Posta Stamps

Føroyar Nr. **57**

Februar 2024



Posta
FAROE ISLANDS


**Føroyskar LP-plátur**

**Europa 2024: Undir vatnskorpuni**

**Lívrunnin list II: Súsan í Jákupsstovu**

# Føroyskar
# LP-plátur




Tíðin stendur ikki í stað. Vit koma, og vit fara. Við í mentanarliga førninginum hava vit kvæði, sang og tónleik. Enn sum áður hava hesi týdning fyri okkum menniskju, tí tey nema við hjartastreingir okkara, í gaman og álvara.

At vit tøkniliga kunnu fáa endurgivið ljómandi sang og tónleik, hevur ikki altíð verið ein sjálvfylgja. Kvæðini livdu í øldir sítt egna lív, har ættarlið eftir ættarlið førdu arvin víðari inn í framtíðina, eins og kingosálmar, og seinni sálmasangir, eisini hava djúpar røtur í føroysku sangmentanini.

Tøkniliga menningin náddi eisini okkara oyggjar, og forfedrar okkara hava undrast, tá teir á fyrsta sinni sóu eitt gandakent tól endurgeva talu og sang.

Í Føroyum lýstu krambúðir við sølu av grammofonum og plátum í 1906.

Fyrstu grammofonplátuna við føroyskum sangum við sølu fyri eyga gav altjóða fyritøkan "*His Masters Voice*" út. Plátan var í sølubúðunum í Havn og á Tvøroyri í 1928.

Í 1937 komu tríggjar plátur út á plátufelagnum "Polyphon". Felags fyri fyrstu royndirnar at fáa føroyingar áhugaðar at keypa plátur við føroyskum tilfari var, at sangarinnurnar vóru útlendskar.

Í 1946 vóru føroyingar til reiðar at fáa sungið inn føroyskt tilfar, og næstu árini komu fleiri plátur. Sum frá leið sóust eisini onnur útlendsk plátufeløg, og úrvalið av plátum øktist. Talan var í høvuðsheitum um fosturlandssangir, kórsang og andaligan sang.

Í seinnu helvt av 1940unum varð fyrsta føroyska plátufelagið stovnað, "Grammofonupptøkan", ið var tætt knýtt at brøðrasamkomuni í Klaksvík. Hetta felag gav út hópin av plátum, fyrst og fremst við andaligum sangi og tónleiki.

**Føroyskar LP-plátur**
Snið: Posta / í samstarvi við John Dam

Útvarp Føroya byrjaði við regluligum sendingum í 1957, og tá hendir ein verulig broyting. Nú floymdi føroyskur og útlendskur tóneikur inn í hvørja stovu í Føroyum.

Hetta gav nýggjar møguleikar, og undirhaldstónleikurin tók dik á seg. Næstu árini kom hópin av plátum út, mangar landaplágur, ið javnan enn eru at hoyra.

Upptøkurnar til fyrstu pláturnar innan undirhaldstónleikin, tátíðar popptónleikin, vóru primitivar, men við snildi, hegni og brennandi áhuga fyri at skapa nakað nýtt, fóru fyrstu upptøkurnar fram inni í einum køki, einari stovu ella í einum kjallara. Undangongumenninir, tveir handilsmenn í Havn, slóðaðu fyri og góvu ungdómunum møguleika at royna seg við tilfari, ið kundi koma út á plátur.

Verulig upptøkuhøli til sang og tónleik vóru ikki tøk í Føroyum um hetta mundið. Møguleikarnir hjá nýstovnaða útvarpinum vóru avmarkaðir, tí fóru flestu tónleikaupptøkur fram aðrastaðni í landinum. Upptøkuhøli komu í sjeytiárunum.

Fyrsta LP-plátan kom í seinnu helvt av sektstiárunum, áðrenn tað vóru bert single- og EP-plátur komnar út.

Fyrst í nítiárunum hvarv plátan, tá fløgan bleiv nýggjasta tøkniliga frambrotið. Síðan lat alheimurin seg upp, og onki er, sum tað var. Hóast tøkniliga menning innan tónleikavinnuna, so hevur hendan eisini skapt ein tørv, eitt forvitni, og leitað verður aftur á slóðina. Ikki so fáir tónleikarar og tónleikabólkar síggja tað sum ein dýrgrip, ein varða, at fáa útgivið eina LP plátu.

Frímerkið myndar plátuhúsar, ið umboðaðu bróðurpartin av tí tónleiki, ið var frammi tey á leið 25 árini, LP-pláturnar høvdu sína stórleikatíð í Føroyum. Hetta var frá seinnu helvt av sekstiárunum og fram til byrjanina av nítiárunum. Her er andaligur tónleikur, fólka-, vísu- og spælimanstónleikur, jazztónleikur, barnatónleikur og rokktónleikur. Tónleikur til gaman og álvara.

*Hans Egholm*



Europa 2024: Lívið

# Undir vatnskorpuni










**Europa 2024: Lívið undir vatnskorpuni**
Myndir: Harald Bjørgvin

**23 KR:** Bertákna, *Facelina bostoniensis*. Mynd tikin inni á Sundi 19.05.2020.

**33 KR:** Yvir/Undir, tari og neyst. Mynd tikin í Akkersvík á Hvítanesi, 07.06.2021.

Myndamaðurin, Harald Bjørgvin hevur tikið myndirnar, sum mynda Europa-frímerkini í ár, har evnið er *lívið undir vatnskorpuni*.

Harald tekur nógvar vakrar undirsjóvarmyndir, og er hetta fyrstu ferð, myndir hansara eru á frímerkjum.

*Um at taka myndir undir vatnskorpuni sigur Harald soleiðis frá:*

Vit eru øll so ymisk, men um einum dámar væl náttúru ella at síggja nakað vakurt og forkunnugt, ja, so átti ein heilt víst at hugt undir vatnskorpuna. Har er so sera vakurt. Onkrastaðni ýður tað av lívi av alskyns slagi, og aðrastaðni sæst taraskógurin danda í aldustevi á ein so vakran hátt, at tú nærum missir teg sjávan burtur.

Vanliga taki eg nakrar hundrað myndir, tá eg kavi, einar 200-500. Er eydnan við mær, havi eg fingið eina ordiliga góða mynd, og onkuntíð hevur tað eydnast mær at fingið 3-5 heilt góðar. Eg royni altíð at fáa myndina so góða sum gjørligt beinanvegin. Her er tað serliga ljósið og tað at fáa tær heilt klárar, sum telur mest, umframt at kompositiónin eisini skal vera í lagi. Taki eg við blitzi, so er týdningarmikið, at tey hava røttu styrkina, og at tey venda rætt, so tey leggja rætta ljósið á myndevnið. Eisini er umráðandi at vera heilt friðarligur fyri at órógva havbotnin sum minst.

Tá myndin, har mann bæði sær omaná og undir vatnskorpuni, skuldi takast, var millum annað timingin avgerandi. Myndatólið skuldi venda soleiðis, at eg sá eitt sindur niður á vatnskorpuna, meðan skeringin var á leið mitt í myndini. Myndin undir vatnskorpuni mátti eisini vera passaliga ljós, samstundis sum ljósið omanfyri ikki mátti vera ov ljóst. Tí mátti eg brúka blitzini undir vatnskorpuni og stilla myndatólið, soleiðis at ljósstyrkin omanfyri var passalig. Nakað av bleytum sólarljósi var júst tá, og hetta hjálpti væl til. Myndin skuldi eisini vera skørp allan

vegin, bæði tarin, sum var beint við, og neystið, sum var nakrar metrar burturi.

Taki eg makromyndir, sum eru heilt nær, má eg hyggja tætt runt um meg fyri at leita eftir myndevnum. Brúki eg víðvinkullinsuna, skal eg hyggja longur, tí tá skal eg hugsa um landslagsmyndir ella taramyndir. Her er eisini gott at brúka tað natúrliga ljósið, sum er. Um tað er sól, er upplagt at liggja ovarlaga í sjónum og soleiðis brúka sólstrálurnar í myndunum. Tað er sera flott, tá sólin stavar niður ígjøgnum sjógvin og lýsir upp sera litríka taran.

Inni í fjøruni er mestsum altíð tari. Tað, sum skal til, er, at hann kann festa seg á steinum ella hellu. Tey tarasløg trívast á grunnum vatni. Á djúpri vatni eru onnur sløg av tara. Júst í Akkersvík er sera nógvur tari teir fyrstu metrarnar, hetta sæst væl, tá fjøra er. Ymisk sløg av tara eru har, og vaksa hesi lið um lið. Tey finna sítt pláss, eins og hevði eitt urtagarðsfólk sett tey niður. Onkur tari er trevsutur, annar hevur bløð, sum eru tjykkri ella tynri. Summi eru so tunn, at tey eru gjøgnumskygd. Eitt annað, sum er sermerkt fyri tara, er, at hann ofta er sera litríkur. Har eru gulligir litir, grønligir, reydligir og brúnligir. Ofta tá sól er, so er hetta litspæl í taranum á grunnum vatni sera skiftandi og litríkt.

Bertáknur eru av vakrastu og litríkastu dýrum. Tær eru kúvingar við ongum húsa og skríða sum sniglar. Navnið *bertákna* kemur av, at táknurnar, andingargøgnini, liggja berar aftarlaga oman á rygginum. Tær eru at finna í øllum heimsins høvum heilt úr vatnskorpuni og niður á meira enn 700 metra dýpi. Fleiri enn 3.000 sløg eru funnin higartil.

*Harald Bjørgvin*



**Taraskógurin dandar í aldustevi**
Mynd: Harald Bjørgvin

# Súsan í Jákupsstovu:
# Lívrunnin list II




Í røðini lívrunnin list er listarfólkið hesa ferð Súsan í Jákupsstovu (f. 1946). Við sera drúgvari útbúgving innan alt hondarbeiði hevur Súsan skapað list og gagnlist av ymsum slag við sera fjølbroyttari tøkni. Vit kunnu nevna akvarell, veving, seyming, leir og tóvirki.







**Lívrunnin list II**
Listaverk: Súsan í Jákupsstovu
23 KR: Steinar - tøvdir úr seyðaull
48 KR: Kavalandslag

Súsan hevur verið slóðari í tí rákinum, sum nú er. Nú tosa øll um stuttflutt og um at minka um rusk og brúka alt okkara heimliga tilfeingi. Fyri mongum árum síðani kannaði Súsan, hvussu teir garvaðu skræðu í Norðurnoreg. Og hon hevur nýtt skræðu og fiskabein eins og vomb og annan úrdrátt úr seyði í síni list. Súsan hevur eisini gjørt pappír at brúka í sínum verkum.

Eitt annað slóðbrótandi verk var Lista- og handverksskúlin á Sandi, sum Súsan byrjaði, men sjálvsagt krevst politiskur vælvilji til slíkt stórverk, og skúlin helt uppat eftir 4 ár.

Súsan heldur, at tað, sum hevur størstan týdning, er, at vit brúka okkara egna tilfeingi. Hóast tað er gott og gagnligt, at fólk fara av landinum at læra, er umráðandi at byggja á heimliga grund, at vit arbeiða her, sum vit eru, og brúka okkara egna siðaarv.

Súsan hevur gjørt ymiskt arbeiði í fleiri kirkjum. Sands kirkja bleiv umvæld eftir eldsbruna í 1989, og Súsan, sum búði á Sandi, bleiv biðin at gera tað vovna innbúgvið og myndprýðing - gólvleypara og prýði á prædikustólin fyri hvønn part av kirkjuárinum; veving og myndaveving hevur verið ein megintáttur í listarliga arbeiðinum hjá Súsan, og ofta – sum í tí førinum - hevur hon litað tógvið sjálv.

Súsansa myndevni er ofta tikin úr náttúruni í Føroyum. Hesi bæði frímerkini: "*Kavalandslag*" og "*Steinar*" eru góð dømi um listina hjá Súsan.

"Kavalandslag" hevur ullinta bakgrund, sum er vovin úr føroyskum tógvi og hevur áseymaðar og broderaðar staklutir. Tilfarið er skræða, vomb, heimagjørt pappír og silki. Tað er kalt, kavi summastaðni og ísur aðrastaðni, og grót ella viður sæst undan kavanum, kanska onkur seyður, sum krokar. Hvítt, gulligt og heitt brúnt. Kaldir og heitari rútar, einki er heilt deytt. Ella – okkurt livir undir kavanum, liggur í dvala.

Verkið "Steinar" er skulpturur, tveir steinar, ikki ein mynd av tveimum steinum. Tilfarið er ull, tøvd og formað til steinar, og fyllan er broddur. Originalt verk, og einki umboðar okkara land so væl sum ein steinur. Sum ein ullarmaki til yrking Karstens Hoydal *"tú skæri korkagrái klettur"*, korkin eitt so fínt grátt lag, sum sæst í gjøgnum í støðum og *"fær steinin at svara"*.

Í sonnum verk sum biðja lesa seg.

*Bergljót av Skarði*

*Súsan í Jákupsstovu fekk eisini heiðurin at sniðgeva Kærleikskúluna 2023, sum Dugni gevur út á hvørjum ári. Kærleikskúlan við heitinum "Friðardúgva" myndar eina bládúgvu, og inni í glaskúluni liggja trý lítil fræ. Kærleikskúlan 2023 sæst á fyrstadagsbjálvanum.*



**Súsan í Jákupsstovu**
Mynd: Fotostudio

# Sepac 2024:
# Fossá




Soleiðis yvirhøvur kann mann siga, at føroyska staðlýsingin serliga í norðara parti av landinum er merkt av fjallalendi og dølum av ymsari støðd og hædd.




**Sepac 2024: Fossá**
Mynd: Marylee Burman

Brattar fjallalíðir við vatnrøttum hamrum – og allastaðni skarað av meira ella minni loddrøttum áarløkum, sum breiðkast longur oman teir koma. Í dallendi uppi og niðri renna løkirnir ofta saman og verða til áir – ella savnast í fjallavøtnum av ymsari støðd, sum fyri sín part eru upphav til tær stóru áirnar, sum áhaldandi renna seinasta strekkið oman á sjógv.

Føroyska undirstøðið er harður klettur, ið stavar frá gosvirksemi í Miðatlantsrygginum frá tíðini, tá tektoniska plátan við norðuramerikanska/grønlendska heimspartinum skiltist frá eurasisku plátuni og Atlantshavið varð til. Lag eftir lag av flótandi lava løgdu seg oman á hvørt annað í fláum, storknaðu og vórðu til basaltgrýti. Tíðarinnar tonn, vindur og veður, ein ístíð fyri og onnur eftir, landsøkking og hækking máaðu av basaltslættanum – til bert oyggjarnar, vit kenna í dag, stóðu eftir.

Tað sigur seg sjálvt, at grundvatn ikki finst í slíkum landslagi. So alt ósalt vatn í Føroyum er omanávatn, ið stavar frá regni og kava – og ófrávíkiliga fylgir atdráttarlógini og rennur oman til strandar. Regni hava vit ivaleyst av um okkara leiðir, men skerpingur kemur meira enn so fyri, tá tað ikki regnar í longri tíð.

Og tað sæst skilliga í landslagnum, sum brádliga skiftir útsjónd í glopraregni. Óskæru strípurnar har fjallaløkir finnast, túsna upp og verða skúmandi hvítar – og áirnar vaksa til villar streymar seinasta strekkið oman til strandar.

Áarføri kalla vit tað, tá áarlopið fyllur ánna, rívur áarbakkan og hóttir við vatnflóð.

Í brøttum líðum og homrum koma mangir og stórir fossar fyri. Teir finnast allastaðni, har brattlendi er – í mongum og ymsum skapi – og summir av teimum eru rættuliga stórfingnir, tá teir gera burtur úr sær. Vit hava fyrr útgivið frímerki við stórum fossum, m.a. Svartafossi í Havn, Múlafossi í Gásadali og Skorá við Leynavatn.

## Føroya størsti fossur

Men størstur og glæsiligastur av øllum føroysku fossunum er Fossá, eitt sindur sunnanfyri Haldórsvík á Norðstreymoy. Úr Víkarvatni í fjalladalinum millum Vatnfelli og Gásafelli rennur áin oman gjøgnum Fossdal, har fleiri aðrir løkir menna hana, til hon at enda stoytir seg út av einum hamri 140 metrar uppi - rakar enn ein hamara og stoytir oman í klettarnar niðast í fjallasíðuni – haðan hon rennur út á sjógv.

Tá turt er í veðrinum er fossurin sjáldan meira enn 1-2 metrar breiður. Men í regni kemur hann veruliga til sín rætt og er yvir 30 metrar breiður um ovasta tvídeilda fallið. Svarta basaltgrundin økir um dramatiska máttin í hvíta skúminum. Ert tú so heppin at vera hjástaddur ein dag, tá bæði stormur og regn leika í, kanst tú uppliva serstaka føroyska fyribrigdið, tá fossurin flettur upp um seg – t.v.s. tá hvirlurnar fara undir vatnið og senda tað uppeftir.

*Anker Eli Petersen*



**Fossá**
Mynd: iStock, Goncalo Perpetuo

Galdandi frá 1. januar:

# Postgjøld 2024

## Brævastøddir

| Brøv | Brævpakkar |
|---|---|
| í mesta lagi<br>23 x 33 x 1 cm | Longd + breidd + tjúkd<br>í mesta lagi 90 cm |
| <br>1 cm tjúkt | <br>l + b + t = 90 cm |

## Brøv í Føroyum

| Vekt | Brøv | Bræv-pakkar |
|---|---|---|
| 0 - 100 g | 23 kr | 48 kr |
| 101 - 250 g | 33 kr | 61 kr |
| 251 - 500 g | | 61 kr |
| 501 - 1000 g | | 76 kr |
| 1001 - 2000 g | | 76 kr |

## Brøv til útheimin

| Vekt | Brøv | Bræv-pakkar |
|---|---|---|
| 0 - 100 g | 33 kr | 84 kr |
| 101 - 250 g | 67 kr | 97 kr |
| 251 - 500 g | | 97 kr |
| 501 - 1000 g | | 140 kr |
| 1001 - 2000 g | | 240 kr |

**Innskrivað bræv:** 50,00 kr. + postgjald.

Atkvøða 2023:

# Ársins frímerki

So kunnu vit kunngera úrslitið av atkvøðuni ”Ársins frímerki 2023”.

Vinnarin gjørdist vakra smáarkið, sum varð givið út í sambandi við at Martin Mörck hevði latið úr hondum 1000 frímerki. Smáarkið myndar málningin hjá Emil Krause frá 1933 við heitinum ”Aftur av útróðri”. Martin Mörck hevur graverað frímerkið, sum við støddini 62 x 82 mm er tað størsta hondgraveraða frímerki nakrantíð.

Á øðrum plássi er smáarkið ”60 ár á Sornfelli”, sum vísir vakra útsýni av Sornfelli har radarstøðin ”NATO Early Warning Station Site 09” varð bygd í 1963. Myndina hevur Jákup Brúsá tikið.

Á triðja plássi er enn ein av stóru útgávunum í 2023, nevniliga føroyska frímerki nr. 1.000. Edward Fuglø hevur sniðgivið vakra smáarkið, sum myndar ein varða. Huglagið er summarkent, og varðin er umgirdur av tí plantu-, fugla- og djóralívi, sum er at síggja í haganum hesa ársins tíð. Huldan og nykurin eru somuleiðis partur av myndini.

Lutakast hevur verið og hava vinnararnir fingið beinleiðis boð um hetta. Vit takka fyri luttøku og ynskja vinnarunum hjartaliga til lukku.










1 **Mörck nr. 1.000**
FO 1001
21% av atkvøðunum
Málningur: Emil Krause
Gravura: Martin Mörck

2 **60 ár á Sornfelli**
FO 992
11% av atkvøðunum
Mynd: Jákup Brúsá

3 **Frímerki nr. 1.000**
FO 1000
10% av atkvøðunum
Listafólk: Edward Fuglø
Gravura: Martin Mörck






| | | |
|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **Føroyskar LP-plátur** | **Europa 2024** |
| **Útgávudagur:** | 27.05.2024 | 27.05.2024 |
| **Virði:** | 61,00 kr. | 23,00 og 33,00 kr. |
| **Nummar:** | FO 1014 | FO 1015-1016 |
| **Stødd, frímerki:** | 40,0 x 30,0 mm | 40,0 x 30,0 mm |
| **Stødd, smáark:** | 72,0 x 50,0 mm | |
| **Myndir / listafólk:** | Posta | Harald Bjørgvin |
| **Prentháttur:** | Offset + lakk | Offset |
| **Prentsmiðja:** | Bpost, Belgia | Bpost, Belgia |
| **Postgjaldsbólkur:** | Innanoyggja brævpakki, 101-500 g. | Bræv – innanoyggja og til útheimin, 0-100 g. |
| **Aðrar vørur:** | | Sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum og 2 postkort |

Frímerkini eru bert royndarprent og ikki altíð endalig.









| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **Lívrunnin list II** | **Sepac 2024: Fossá** | **Trónuskifti** |
| **Útgávudagur:** | 27.05.2024 | 27.05.2024 | 27.05.2024 |
| **Virði:** | 23,00 og 48,00 kr. | 33,00 kr. | |
| **Nummar:** | FO 1017-1018 | FO 1019 | FO 1020 |
| **Stødd, frímerki:** | 40 x 30 mm | 26 x 40 mm | |
| **Myndir / listafólk:** | Súsan í Jákupsstovu | Marylee Burman | |
| **Prentháttur:** | Offset + lakk | Offset | Offset |
| **Prentsmiðja:** | Bpost, Belgia | Cartor Security Printers | |
| **Postgjaldsbólkur:** | Bræv og brævpakki, innanoyggja, 0-100 g | Bræv til útheimin, 0-100 g | |

***Meira kunning og bílegging í næsta blaði.***

**Vørurnar kunnu bíleggjast á www.stamps.fo uml. eina viku áðrenn útgávudagin**

**Layout:** Posta Stamps
**Perma:** Bertákna
**Mynd:** Harald Bjørgvin
**Prent:** Føroyaprent
ISSN 1603-0036

Posta Stamps
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

**Tlf.** 346200
stamps@posta.fo
**www.stamps.fo**

@FaroeIslandsStamps
@faroeislandsstamps
@FaroeseStamps